# Næmingar spæla nýggjan sjónleik



Í næstu viku fara næmingar á NámX í Eystursskúlanum at spæla sjónleik í Sjónleikarahúsinum.

Leikurin verður spældur týsdagin, mikudagin, hósdagin og fríggjadagin, tvær ferðir hvønn dagin, fyrru ferð klokkan 10 og aðru ferð klokkan 13.

Hesar sýningarnar eru fyri næmingarnar í framhaldsdeildunum, men týsdagin sleppur almenningurin eisini inn.

Men so verða eisini sýningar fyri almenninginum leygardagin, 12. mars og sunnudagin 13. mars, báðar dagarnar klokkan 19.

Tað er Harriet Poulsen Vágadal, lærari í NámX, sum hevur skrivað leikin og hon leikstjórnar eisini.

Leikurin hevur heitið »Eitt døkt kamar« og tað eru næmingar á Films- og dramabreytini í NámX, sum spæla og sum eisini og taka sær av pallinum.

Leikurin er um um 16 ára gomlu Elisu, ið verður happað, og um hvussu hetta ávirkar hana og alt rundan um hana.





## Tunnur til føstulávint ella havaprýði

Tær kendu gomlu whiskytunnurnar er nú at fáa í Føroyum. Tunnnurnar kunnu brúkast bæði til tunnusláing og sum prýði í havanum.

Handilsfyritøkan Jógvan Weihe er kend fyri sítt stóra vøruúrval, har fæst alt millum himmal og jørð. Til fastalávint hevur fyritøkan fingið tær væl umtóktu whiskeytunnurnar, sum eru kendar fyri sína styrki.

Frá Jógvan Weihe verður sagt, at tunnurnar verða fyrst nýttar í Fraklandi til at goyma cognac í, síðan verða tær sendar til Skotlands, har tær verða nýttar í stóra Glenfiddich destillarínum til at goyma whisky í - heilt upp til 30 ár. Tunnurnar eru gamlar og sterkar, so tað er ein serlig avbjóðing at sláa tær sundur. Ólavur Weihe, stjóri í P/f Jógvan Weihe, sigur, at tunnarnar eru eisini sera væl egnaðar sum havaprýði til nógv ymisk endamál.

# 84 ára gamli Meinhard polstrar við kønari hond

**TÓNLEIKUR Hesa seinastu tíðina hevur tann Meinhard Hansen á Nesi nýtt loftsstovuna í missiónshúsinum í Tabor á Toftum sum sítt arbeiðsrúm**

Snorri Brend

Í loftsstovuni polstrar hann gomlu møblarnar av nýggjum, sum hava staðið í niðaru loftstovuni í Tabor.

Møblarnir, sum eru arvagóðs frá Ingu Nørgaard, f. Højgaard, innan av Regni á Toftum. Teir hava verið nógv nýttir, og tí vóru teir væl slitnir, skrivar heimasíðan www.tabor.fo

Nú hevur Meinhard bjóðað seg fram at gera teir lidnar. Hann hevur polstrað tríggjar stólar, og er á myndini í holt við tað fyrru sofuna.



*Meinhard og konan Judit Hansen búðu eitt skiftið í Danmark, og tá leigaði ein polstrari frá teimum. Tá fekk Meinhard innlit og áhuga fyri polstring, og nú fáa so gomlu møblarnir gleði av hansara kønu hond*

# Toskafiskiskapurin hvílir á einum árgangi

**GRØNLAND Í 2005 eydnaðist gýtingin hjá toskinum í Grønlandi væl, og síðani hevur hesin árgangurin veirð grundarlag undir fiskiskapinum**



Árni Joensen

Í 2005 eydnaðist gýtingin hjá toskinum í Grønlandi væl, og síðani hevur hesin árgangurin verið grundarlag undir fiskiskapinum. Men trupulleikin er, at hesi fimm árini síðani er hevur eingin góður árgangur verið, og tí eru menn farnir at spyrja, hvat hendir, tá 2005-árgangurin fer úr fiskiskapinum.

Spurningurin var til umrøðu í Landstinginum nú um dagarnar. Siumut-tingmaðurin Karl Lyberth hevði sett Ane Hansen, landsstýrismanni fyrispurning um, hvussu nógvur toskur verður eftir í Grønlandi, tá 2005-árgangurin er fiskaður. Í svarinum ásannaði landsstýrismaðurin, at eingin góður árgangur hevur verið síðani 2005, og at niðurstøðan tí má vera, at toskafiskiskapurin hvílir á einum sera veikum grundarlagi.

– Skulu vit hava ein varandi toskafiskiskap, er tað ein treyt, at vit fáa fleiri góðar árgangir, sum kunnu koma fyri teir, sum hvørva úr fiskiskapinum, segði Ane Hansen í svarinum.

Grønlendski náttúrustovnurin Pinngortitaleriffik ger í løtuni kanningar innanskers nærhendis Sisimiut, Nuuk og Qaqortoq fyri at vita, um meiri ungfiskur er á veg inn í fiskiskapin, sigur KNR.